# Barnahúsið 2022



Ársfrágreiðing

Februar 2023

Barnaverndarstova Føroya

# Inngangur

Innan barnaverndararbeiðið síggja vit javnan, at mál koma fram, har talan er um harðskap og kynsligan ágang móti børnum og ungfólki. Tá mugu barnavernd, løgregla og lækni samstarva og í felag finna gongdar leiðir. Hetta er orsøkin til, at júst hesir partar eru teir, ið vara av Barnahúsinum. Barnaverndarstova Føroya samskipar hetta samstarv.

Barnahúsið hevur sum endamál at vera ein felags karmur fyri slíkum samstarvi, tá tørvur er á tí. Avbjóðing okkara er, at umhvørvið í Barnahúsinum støðugt hvílir á einum tryggum grundvølli – við væl skipaðum mannagongdum fyri dagliga arbeiðið, við góðum sambandi millum allar avvarðandi partar, og at málini verða avgreidd so skjótt, sum til ber.

Hendan ársfrágreiðing – tann níggjunda av sínum slagi - er skrivað fyri at geva myndugleikum og almenninginum innlit í starvsøkið. Tað er okkara vón, at ársfrágreiðingarnar gera sítt til at lýsa støðuna á ein skynsaman hátt, samstundis sum tað kemur til sjóndar, at føroyska samfelagið ikki letur harðskap og kynsligan ágang móti børnum og ungum fara aftur við borðinum.

*Oddbjørg Balle*

**Leiðari á Barnaverndarstovu Føroya**

# 1. Støðið undir virksemi okkara

Barnahúsið hevur verið virkið síðan 1. januar 2014. Hildið verður til í leigaðum hølum í Tórshavn, sum eru serliga innrættað til sítt endamál. Fyri nøkrum mánaðum síðani fekk Barnahúsið uppsøgn upp á leigumálið. Arbeitt verður við at finna nýggj hóskandi høli, og vónandi fer hetta at eydnast í 2023.

Málbólkurin er børn og ung, sum eru til og við 17 ár og familjur teirra.

Arbeitt verður við málum, ið snúgva seg um kynsligan ágang ella annan harðskap móti børnum og ungum. Ágangurin kann vera framdur fyrr í lívinum hjá barninum, ella kann talan vera um nýliga íkomin mál. Yvirskipað er uppgávan at veita barni og familju trygd fyri væl grundaða fakliga viðgerð. Hetta verður gjørt við at samskipa samstarv millum almennu myndugleikarnar, barnavernd, heilsumyndugleikar og løgreglu.

Barnahúsið er innrættað við serligum denti á, at tey, sum kanna málini, kunnu hittast á jøvnum føti við børnini og tey ungu.

Børn, ung og familjur koma í Barnahúsið eftir áheitan frá barnaverndartænastunum. Familjur kunnu ikki sjálvar venda sær til Barnahúsið.

Í Barnahúsinum:

- fáa børn ella ungfólk og avvarðandi teirra sálarfrøðiliga kreppuhjálp og kreppuviðgerð
- verður mett um tørvin á læknakanning
- avhoyrir løgreglan børn til og við 14 ára aldur við videoútgerð og avhoyrir ung, sum eru 15 til og við 17 ára gomul
- verður mett um framtíðar tørvin hjá barninum ella ungfólkinum á serligum stuðli og serligari viðgerð
- fáa málsviðgerar í barnaverndartænastunum ráð og hjálp til at greiða og greina tørvin á stuðli. Hetta verður alt gjørt sum liður í barnafakligu kanningini sambært § 45 í barnaverndarlógini.

## Tilmæli um dagføring av tilboðnum hjá Barnahúsinum

Við skjótt tíggju árum á baki er greitt, at vit hava gjørt okkum ymsar royndir, eins og vit í samstarvi okkara við barnahús í grannalondum fylgja við, hvørjar royndir tey gera sær. Niðanfyri greiða vit frá, hvat vit halda skal til, fyri at føroyska Barnahúsið kann veita føroyskum børnum, sum hava verið fyri ágangi, og familjum teirra eitt nútíðarhóskandi og dygdargott tilboð.

### 1. Børn, sum hava framt ágang á børn

Tað kemur fyri í barnahúsmálum, at tað eru børn ella ung undir 18 ár, ið hava framt ágang á børn. Hesi børn hava tørv á viðgerð, og tað er alneyðugt, at tey fáa professionella hjálp. Bæði fyri at koma fyri seg, og fyri at fyribyrgja framtíðar ágang. Í Danmark er viðgerðin av hesum

børnum flutt til barnahúsini at viðgera. Barnaverndarstovan mælir staðiliga til, at sami leistur verður fylgdur í Føroyum, og at virksemið hjá Barnahúsinum verður víðkað til hendan málbólk. Vit hava bygt upp servitan og royndir í Barnaverndarstovuni og Barnahúsinum, sum eru natúrligar fortreytir fyri hesum virksemi.

## 2. Børn, sum hava verið fyri sálarligum harðskapi

Har børn eru fyri sálarligum harðskapi, eru fylgjurnar eins skaðiligar og tær fyri likamligum ella kynsligum ágangi. Tey hava sostatt sama tørv á sálarfrøðiligari hjálp og viðgerð. Í Danmark eru hesi børn málbólkur hjá barnahúsum, og hetta meta vit eisini eigur at galda í Føroyum. Barnahúsið hevur rætta førleikan og royndir at veita hesa viðgerð. Leggjast skal afturat, at her krevst tillaging í føroysku revsilógini, har sálarligur harðskapur enn ikki er komin við.

## 3. Foreldur, sum hava framt harðskap móti egnum børnum

Grannalond okkara hava eisini víðkað um tilboðið í barnahúsunum til at umfata *foreldur*, sum hava framt harðskap ímóti sínum børnum. Orsøkin er, at børnini sum oftast hava framhaldandi samband við síni foreldur, hóast tey hava verið fyri harðskapi frá foreldrunum. Tí er umráðandi, at øll familjan fær sálarfrøðiliga viðgerð í barnahúsi, við tað at hesi hava flest royndir og serkunnleika innan økið. Vit mæla sostatt til, at virksemið hjá Barnahúsinum eisini fevnir um hesi foreldur. Tað vil siga, at virksemið fer frá útilokandi at vera kreppuviðgerð til barnið og foreldur, sum ikki eru undir illgruna, til eisini at fevna um sálarfrøðiliga viðgerð til alla familjuna, herundir eisini tann, sum er undir illgruna fyri at fremja harðskap móti sínum barni.

## 4. Frá kreppuhjálp til fullfíggjaða sálarfrøðiliga viðgerð

Higartil hevur sálarfrøðiliga viðgerðin í Barnahúsinum umfatað sálarfrøðiliga kreppuhjálp til barnið. Tað vil siga, at tá kreppuhjálpin er liðug, metir sálarfrøðingurin hjá Barnahúsinum um, hvørt barnið hevur tørv á mera sálarfrøðiligari hjálp fyri at koma fyri seg. Tað hevur, sum vera man, týdning at hendan hjálp verður veitt skjótt. Veruleikin er tó, at tað meir enn so vísir seg, at long bíðitíð er at sleppa til skikkaðan sálarfrøðing – alt eftir hvar í landinum barnið býr, og hvussu long bíðitíðin er har. Tað merkir, at endamálið um, at “mál um ágang fáa somu dygdargóðu viðgerð kring alt landið” ikki altíð verður rokkið. Mett verður, at tað hevði verið eitt risastórt framstig, um Barnahúsið kundi veitt børnum, sum hava tørv á tí, sálarfrøðiliga viðgerð eftir kreppuhjálpina. Hetta hevði tryggjað einsháttaða viðgerð av øllum føroyskum børnum. Skal hetta bera til, er tørvur á einum sálarfrøðingi afturat í Barnahúsið.

5. **Framleiðsla av kunningartilfari til børn, ung og foreldur**

At enda heldur Barnverndarstovan tað vera átrokandi, at framleitt verður kunningartilfar um ágang móti børnum – til børn, ung og foreldur. Umráðandi er, at børn kenna til sínar møguleikar og rættindi, um tey koma í ella eru í vanda fyri at verða fyri ágangi. Ella um onkur, ið stendur teimum nær, er í hesi støðu. Vit eru sannførd um, at hetta kundi havt við sær fyribyrgjandi ávirkan. Við tað at vit hava dyggastu vitan og royndir, meta vit tað sjálvsagt, at hendan kunningaruppgáva liggur hjá Barnahúsinum. Eisini at vit føra hagtøl - bæði almenn og innanhýsis - á barnaverndarøkinum. Hetta merkir, at vit í mestan mun hava fingurin á pulsinum og síggja fyrst tey rák, sum eru á økinum. Tað ger eisini, at vit vita, hvør tørvur er á kunning, og nær tørvur er á kunning hjá ymsu málbólkunum.

**Politisk raðfesting neyðug**

Skal tað bera til at víðka virksemið hjá Barnahúsinum til tey omanfyristandandi:

- Børn, sum hava framt ágang á børn
- Børn, sum hava verið fyri sálarligum ágangi í sínum nærsambondum
- Foreldur, sum hava framt harðskap móti egnum børnum
- Frá kreppuhjálp til fullfíggjaða sálarfrøðiliga viðgerð
- Framleiðslu av kunningartilfari til børn, ung og foreldur

er neyðugt við politiskari raðfesting. Neyðugt hevði verið at sett ein sálarfrøðing afturat í Barnahúsið. Við hesum hevði borið til at veitt hesum børnum og teirra familjum sálarfrøðiliga viðgerð, tá tørvur var á tí. Framleiðsla av kunningartilfari hevði eisini kravt størri tilfeingi, tað vil siga størri játtan.

# 2. Illgruni um ágang móti børnum og ungum

Mál, ið arbeitt verður við, byrja ofta við einum *illgruna*, og tí snúgva upplýsingarnar um virksemi okkara seg um ágang, sum illgruni ella ein ávís vitan er um. Løgreglan metir síðan um, hvørt ákæra eigur at verða reist í málinum. Tað kann taka sína tíð, áðrenn dómur møguliga fellur í rættinum. Strikast skal tí undir, at hagtølini í hesi frágreiðing snúgva seg um fólk, ið eru undir illgruna.

Í málum av hesum slagi er tað nú einaferð soleiðis, at próvbyrðan skal lyftast á fullgóðan hátt, hóast umstøðurnar stundum bæði kunnu vera torgreiddar og kámaðar burtur í einum truplum tíðarskeiði hjá barninum. Tískil kann stundum vera ilt at meta um, hvat í roynd og veru kann vera farið fram við barninum.

# 3. Mál í Barnahúsinum

Tá ein barnaverndartænasta boðar Barnahúsinum frá um eitt barn, har illgruni er reistur um kynsligan ágang ella annan harðskap, verður eitt mál stovnað í Barnahúsinum.

Tá eitt mál verður skrásett sum *virkið*, merkir hetta, at arbeitt verður við málinum. Tá málið verður skrásett sum *endað*, verður ein afturboðan send til avvarðandi barnaverndartænastu, og málið verður lokað í Barnahúsinum.

Eitt mál verður skrásett fyri hvørt barnið, men eitt barn kann telja upp til fleiri ferðir í hagtalsskipanini, um sama barnið aftur verður fyri ágangi, og tískil aftur gerst eitt mál í Barnahúsinum.

# 4. Ráðgeving

Ráðgeving í sambandi við Barnahúsið verður eisini skrásett, tá áheintarskjal er sent Barnahúsinum. Talan er vanliga um barnaverndartænastur, sum spyrja seg fyri í førum, har illgruni – ella beinleiðis vitan – er um ágang móti einum barni. Tá er umráðandi at fáa greiðu á, um málið skal viðgerast í Barnahúsinum ella ikki.

Síðani 1. mars 2022 hevur løgreglan víðkað møguleikan hjá barnaverndartænastunum á tann hátt, at tær kunnu venda sær beinleiðis til løgregluna umvegis telefon um ráðgeving í møguligum barnahúsmálum.

# 5. Tal av málum



*Samanborið við árið fyri sæst, at barnahúsmálini vóru væl færri í 2022. Úr 33 í 2021 niður í 20 í fjør. Í miðal seinastu 8 árini vóru 29 mál.*
*Somuleiðis er talið av endaðum málum minkað – úr 29 í 2021 niður í 19 í 2022.*

*At talið á endaðum málum liggur so tætt á tali av málum, vísir, at málini í allarflestu førum verða lokað innan nakrar mánaðir. At málini verða liðugt avgreidd skjótt, er í tráð við endamálið hjá pørtunum handan Barnahúsið.*

## 6. Slag av ágangi í málum, sum eru endað




*Talið á málum grundað á harðskap eru minkað munandi í fjør samanborið við undanfarin ár. Við 2 málum er tað er minni enn nakrantíð, síðan Barnahúsið læt upp. Hetta kann vera orsakað av, at tann ráðgeving, ið barnaverndartænastur síðan 1. mars 2022 hava fingið frá løgregluni, hevur havt við sær, at summi mál, sum fyrr vórðu barnahúsmál, nú í staðin verða viðgjørd sum vanlig barnaverndarmál.*

## 7. Ymisku sløgini av ágangi í teimum málum, sum eru viðgjørd í Barnahúsinum

Í Barnahúsinum verða eyðkennini fyri tey ymisku sløgini av harðskapi og kynsligum ágangi skrásett. Í summum førum kann eitt barn bæði hava verið fyri harðskapi *og* kynsligum ágangi.

## Tá vit tosa um harðskap, kann tað vera:

- Lúsingur, brestur, sløg ella spark
- Sligin við onkrum luti
- Kvørkratak
- Brunamerki ella brunasár
- Rykk
- Hóttanir við vápni
- Hóttanir um harðskap
- Viðkomandi hevur sæð harðskap

## Sløg av harðskapi:




*Talvan vísir, tá talan var um harðskap, at í øðrum førinum snúði tað sum lúsing, brest, sløg ella spark og í hinum førinum um hóttan við vápni.*

## Tá vit tosa um kynsligan ágang, sum er brot sambært ásetingum í revsilógini, kann tað vera:

- Skemman í sambandi við KT (umvegis internetið ella fartelefon)
- Mynda- ella filmsupptøka av barni ella unglingi, ið er yngri enn 18 ár
- Keyp av kynsligum tænastum frá barni ella unglingi, ið er yngri enn 18 ár
- Nerta við kynsgøgn hjá tí illtonkta
- Blygdanarskemd (nektan, kávan, lúran, skendsk/ur í orð og tal)
- Neyðtøka av børnum, ið eru yngri enn 15 ár (í revsilógini nevnt samlega)
- Annað kynsligt samband enn neyðtøka (gjøgnum munn, baktarmsop, ymiskt stappað í skeið og baktarmsop)

### Sløg av kynsligum ágangi:




*Her sæst, at í 2022 var neyðtøka av børnum, ið er yngri enn 15 ár, tað slagið av kynsligum ágangi, sum oftast var kannaður nærri í Barnahúsinum. Í einum av hesum málunum var talan um 17 ára gamla gentu, sum var neyðtikin.*

*Harnæst vóru fýra mál við ávikavist øðrum kynsligum sambandi enn neyðtøku og blygdanarskemd.*

## 8. Mál, ið eru kannað og endað í Barnahúsinum. Kyns- og aldursbýti

### Kyn:




*Sum tað sæst á talvuni, er ein yvirvág av gentum, hvørs mál vóru viðgjørd í Barnahúsinum. Yvirvág av gentum er í tráð við tølini tilsamans aloftast seinastu sjey árini.*

### Aldur á barni (tá málið varð endað í Barnahúsinum):




*Sum tað sæst á talvuni, var eisini í 2022 talan um eina lutfalsliga javna spjaðing í aldrinum á teimum børnum, hvørs mál vóru kannað í Barnahúsinum.*

# 9. Um fólk, ið eru undir *illgruna* í sambandi við mál í Barnahúsinum

### Kyn:




*Talvan vísir, at tað eisini í 2022 í mestan mun mannfólk, sum framdu harðskap ella annan ágang móti børnum.*

## Aldur:




*Størsti einstaki aldursbólkurin av teimum, ið eru undir illgruna fyri harðskap ella annan ágang móti børnum, hoyra til bólkin 15-18 ár.*

## Persónligt samband við barnið ella unglingan:




*Bólkurin "Onnur" fevnir eitt nú um onnur børn og ung, grannar og onnur, sum kenna familjuna, fremmandafólk, eins og starvsfólk, ið á ymsan hátt hava við børn at gera.*